## Fult umfar í 1. deild

Um vikuskiftið byrjar fótbóltskappingin hjá teimum næstbestu aftur. Oddaliðið HB vitjar hjá VB/Sumba, meðan TB fær vitjan av B71. Á niðara vølli í Gundadali tekur FC Hoyvík ímóti næstbesta liðnum hjá B68. Í Leirvík spæla næstbestu liðini hjá Víkingi og NSÍ, og Skála vitjar í Miðvági, har MB tekur ímóti.



## Klettskarð aftur í KÍ

Páll Klettskarð, sum seinastu árini hevur spælt við FC Amager, fer nú aftur til barndómsfelagið, KÍ. Páll Klettskarð hevur seinastu tvey árini ment seg nógv sum fótbóltsspælari, og tá FC Amager í vár kom í álvarsligar fíggjarligar trupulleikar, var hann vorðin fastur partur av hópinum kring besta liðið. Í summar flutti hann heim aftur til Klaksvík, og nú hava hann og KÍ gjørt avtalu, sum bindur kropssterka áleyparan at felagnum tað, sum eftir er av kappingarárinum.

- mørk

# Klaksvík skal standa saman



**- Klaksvíkingar mugu ikki meta, at tilgongdin av mær, Atla Danielsen og Páll Klettskarð bjargar KÍ. Nú má alt Klaksvík standa saman og stríðast, sigur Todi Jónsson, sum gleðir seg at spæla á Injector Arena sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð síðan 1993 stendur føroyingum í boði at síggja Toda Jónsson í bestu føroysku fótbóltsdeildini. 37 ára gamli klaksvíkingurin skal nú hjálpa barndómsfelagnum, sum nú av álvara skal stríðast fyri at varðveita sætið í Vodafonedeildini. Og Todi Jónsson er til reiðar at hjálpa.

### Royndin er týdninarmiklast

Todi Jónsson hevur ikki spælt fótbólt á høgum støði, síðan hann royndi at hjálpa Fremad Amager undan niðurflyting í 2007. Nú skal klaksvíkingurin aftur í fótbóltsgaggurnar í royndini at hjálpa barndómsfelagnum undan niðurflyting.

Men Todi Jónsson, stúrir tú ikki at miseydnaðst?

- Sjálvandi havi eg hugsað um tað. Eg havi nógv at tapa við at venda aftur. Men mítt barndómsfelag er í einari truplari støðu, og mín roynd at hjálpa er mest týdningarmikil. Eg kann í øllum førum siga, at eg havi gjørt mítt, sigur Todi Jónsson.

Fyrrverandi landsliðsleikarin hevur seinastu tíðina vant við Søllerød-Vedbæk, sum fyrireikar seg til kappingarári í triðbestu donsku deildini. Umframt tað, hevur hann runnið og styrkivant einsamallur. Hann metir, at hann er í nøktandi venjingarstøðu, men leggur afturat, at hann helst skal spæla nakrar dystir, áðrenn hann av álvara kann gera um seg.

- Tað er trupult at meta um mína dystarvenjing. Men eg standi meg undir venjing í Søllerød-Vedbæk, og eg vænti ikki, at støðið í føroyskum fótbólti sum heild er nógv hægri, sigur Todi Jónsson.

### Veit lítið um B68

Klaksvíkingar sleppa sunnudagin at bjóða Tóda Jónsson, Atla Danielsen og Páll Klettskarð aftur í Injector Arena. Mótstøðuliðið verður B68, sum ikki hevur tapt í seinastu 10 royndunum.

Todi Jónsson gleðir seg at sleppa aftur á vøllin, men staðfestir, at hann veit lítið um toftamenn.

- Eg kenni Øssur Hansen, og tað er mest sum tað. Men eg vænti mær eina stóra uppliving, sigur Todi Jónsson sum hevur búð í Danmark seinastu 15 árini.

### Mugu standa saman

KÍ hevur verið í tungum sjógvi í hesum kappingarárinum. Ungu klaksvíkingarnir hava verið í mótgongd frá fyrsta umfari, og trýsti frá áskoðarunum og føroyingurin hevur ikki betra støðuna. Men Todi Jónsson staðfestir, at nú er tað bretta upp um ermar.

- Klaksvíkingar mugu ikki meta, at tilgongdin av mær, Atla Danielsen og Páll Klettskarð bjargar KÍ. Nú má alt Klaksvík standa saman og stríðast. Tað kann verða avgerandi, at vit spæla framman fyri 2000 áskoðarum, heldur enn 200. Tí mugu vit leikarar, nevnd, áskoðarar – ja, klaksvíkingar standa saman, er áheitanin hjá Toda Jónsson undan dystinum um vikuskiftið.

